## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

---

**Virksemi**

Vinnuframi varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um Vinnuframagrunn. Endamálið hjá Vinnuframa er, at hann skal stuðla vinnuni í avmarkaðan mun - uttan at veita rakstrar- og íløgustuðul. Grunnurin stuðlar tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan.

Kunngerð um virksemið og umsiting hjá Vinnuframa varð lýst 29. november 2001, har landsstýrismaðurin í Uttanríkis- og Vinnumálum, samsvarandi vinnupolitikki Landstýrsins, staðfestir tey vinnugreinaøki, sum serligur dentur skal leggjast á at stuðla.

Umframt omanfyrinevnda virksemi umsitur Vinnuframi eisini stuðulsskipan til skipasmíð, umsiting og játtan til Filmshúsið og ymiskar uppgávur fyri Uttanríkis- og Vinnumálaráðið.

**Árið 2018**

Stýrið fyri Vinnuframa legði dent á at stuðla ráðgeving, menning og sølu í 2018.

1. juli 2018 valdi Brynhild Absalonsen, sum var samskipari á Vinnuframa í gott trý ár, at fara í annað starv. Stýrið broytti í hesum sambandi starvið sum samskipari í Vinnuframa til eitt leiðarastarv.
Mathea Hilduberg varð sett sum leiðari á Vinnuframa 1. september 2018.

Dánial Hoydal, stýrisformaður, valdi at fara úr stýrinum fyri Vinnuframa 1. desember. Uttanríkis- og Vinnumálaráðið valdi Regin Djurhuus Hammer til nýggjan stýrisformann.

1. mai flutti Vinnuframi í nýggj hølí í Sjóvinnuhúsinum á Vestara Bryggju í Tórshavn. Endamálið er at fremja samstarv við aðrar aktørar í vinnuframaskipanini. Fróðskaparsetrið, Framtak, Hugskotið og Filmshúsið húsast eisini í Sjóvinnuhúsinum.

Vinnuframi hevur í 2018, umframt kjarnuøkið í grunninum, umsitið skipasmiðjustuðul og havt ábyrgd av játtanini og umsitingini hjá Filmshúsinum og ábyrgd av játtanini hjá Íverksetarahúsinum.
Vinnuframi hevur eisini verið eygleiðari í Nordic Innovation í 2018.

Vinnuframi hevur í árinum havt fleiri leiklutir innan ES stuðulsskipanina Horizon 2020. Vinnuframi er National Contact Point fyri Horizon 2020 SME, sum er ein ES stuðulsskipan til smáar og miðalstórar fyritøkur og National Contact Point fyri Horizon 2020 ICT, sum er ein ES stuðulsskipan til loysnir innan kunningar- og samskiftistøkni.

Í hesum sambandi hevur Vinnuframi havt tætt samstarv við Granskingarráðið, sum hevur ábyrgdina av føroysku avtaluni við ES um Horizon 2020 stuðulsskipanirnar. Vinnuframi og Granskingarráðið hava saman vitja ráðstevnur í EU-londum, og skipað hevur verið fyri felags kunningartiltaki á skrivstovuni hjá Vinnuframa.

Fleiri føroyskar fyritøkur hava søkt um stuðul úr SME Instruments stuðulsskipanini, og higartil hava hesar fimm fyritøkur fingið stuðul:

- Sp/f Frama, 2016
- Sp/f Blue Ocean, 2017
- Sp/f Deliver, 2018
- Sp/f KPT, 2018
- Sp/f logPh, 2018

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Fyri at gerast sjónligur sum grunnur hevur Vinnuframi í 2018 luttikið á tiltaki hjá Fiskivinnuroyndum á Hotel Føroyum, tiltaki á Copenhagen Business School í Keypmannahavn, tiltaki á Sendistovuni í Keypmannahavn, Jobmatch í Norðurlandahúsinum og fleiri felagstiltøkum saman við Framtak, Hugskotinum og Íverksetarahúsinum.

Í september skipaði Vinnuframi saman við Íverksetarahúsinum, Hugskotinum og Fróðskaparsetrinum fyri tiltakinum Creative Business Cup Føroyar í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum. Vinnarin var við í altjóða kappingini í Keypmannahavn í november 2018. Fleiri enn 50 lond luttóku.

Í november 2018 undirskrivaði Vinnuframi avtalu við Visit Faroe Islands og Íverksetarahúsið um stovnan av einum hópfíggingarportali, sum skal hjálpa íverksetarum við at fáa váðafúsa fígging til vega frá almenninginum. Klárt verður hjá íverksetarum at leggja verkætlanir út á hópfíggingarportalin í apríl 2019.

Rentuinntøkurnar hjá Vinnuframa vórðu tkr. – 295 í mun til tkr. 689 í 2017.
Rentuinntøkurnar skulu eftir ætlan fíggja meginpartin av rakstrinum hjá Vinnuframa, men munurin á rentuni í 2017 og 2018 varð umleið -1 mió. kr. Tískil fór ein munandi partur av stuðulsjáttanini til rakstur í 2018.

Vinnuframi hevur viðgjørt 74 umsóknir í 2018 í mun til 77 umsóknir í 2017. Søkt varð um tkr. 10.034 í 2018 í mun til tkr. 12.085 í 2017.

Í stuðli vórðu í 2018 játtaðar tkr. 2.530 í mun til tkr. 3.650 í 2017. Afturførdur stuðul varð tkr. 681 í 2018.

Við árslok 2018 var tøki peningurin tkr. 28.203, meðan játtaður, ikki útgoldin stuðul, var tkr. 3.064.

**Framtíðin**
Vinnuframi fer í 2019 at leggja dent á at tryggja, at stuðlaðar verkætlanir fáa bestu fortreytirnar fyri at kunnu mennast til framtíðar burðardyggar fyritøkur.

Vinnuframi fer í ein ávísan mun at veita ráðgeving til umsøkjararnar. Endamálið við ráðgevingini er at betra um dygdina av umsóknunum.

Vinnuframi fer framhaldandi at fylgja upp uppá verkætlanir, sum av onkrari orsøk eru seinkaðar ella steðgaðar upp. Um mett verður, at felagið hevur tørv á ráðgeving frá serfrøðingum fyri at lyfta verkætlanina, kann Vinnuframi mæla til, at søkt verður um stuðul til ráðgeving, til dømis til at gera eina virkisætlan ella marknaðarkanning.

Stuðulsmøguleikarnir hjá Vinnuframa skulu framhaldandi gerast meira sjónligir.
Málið fyri 2019 er, at allir føroyingar skulu kenna Vinnuframa, og hvørjir stuðulsmøguleikar eru, bæði hjá nýggjum íverksetarum og meira etableraðum fyritøkum.

Fyri at náa hesum máli verður leypandi lýst á facebook eftir umsóknum og við tiltøkum, ið Vinnuframi er við til at skipa fyri.
Góða samstarvið við Íverksetarahúsið, Hugskotið, Granskingarráðið og Framtak skal framhaldandi útbyggjast.

Vinnuframi ætlar at útbyggja samstarvið við Visit Faroe Islands. Ferðavinnan í Føroyum er í stórari menning, og hetta sæst aftur í innkomnum umsóknum hjá Vinnuframa.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Í juli 2018 varð nýggj kunngerð um stuðul til ferðavinnumenning sett í gildi, ið gevur Visit Faroe Islands heimild at lata vinnuligum menningarátøkum innan ferðavinnuna partvísan fíggjarligan stuðul.

Endamálið er at menna ábyrgdarfullari og burðardyggari ferðavinnu kring alt landið. Vinnuframi ynskir eitt samstarv við Visit Faroe Islands í sambandi við verkætlanirnar innan ferðavinnuna.

Kunning um SME Instruments, undir Horizon 2020 stuðulsskipanini hjá EU, skal fremjast í samstarvi við Granskingarráðið. Orsakað av kompleksitetinum í EU-stuðulsskipanini er ætlanin at hava kunning í smærri forum. Ein kunningarfundur av hesum slagi varð hildin í november 2018. Hann eydnaðist væl. Møguliga verður eisini skipað fyri einum størri tiltaki í 2019.

Fyri at vísa áhuga fyri verkætlanunum, og fyri at Vinnuframi skal síggjast aftur í vinnuni, er ætlanin at vitja feløg, sum hava fingið stuðul. Flestu fyritøkurnar, sum fara undir at menna nýggjar vørur og tænastur, ella hava gjørt eitt marknaðarátak, vilja fegnar tosa um og vísa fram, hvat er komið burturúr. Harafturat er møguleiki fyri at fylgja verkætlanini upp og geva teimum nøkur góð ráð við á vegnum.

Heimasíðan skal gerast meira livandi og kunnandi. Nýggj videobrot og greinar um stuðlaðar verkætlanir skulu leypandi leggjast út á heimasíðuna. Kunning um SME Instruments og ICT (Information and Communication Technology), sum Vinnuframi er National Contact Point fyri, verður leypandi lagt út á heimasíðuna.

Næsta Creative Business Cup verður í Keypmannahavn í juni 2019. Vinnuframi, Hugskotið og Íverksetarahúsið fara í byrjanini av komandi ári at eftirmeta tiltakið og gera eina meting av, hvat vit fáa burtur úr luttøku. Støðið er høgt hjá luttakaranum á Creative Business Cup, tískil er tað týdningarmikið, at føroyska umboðið hevur eitt slóðbrótandi hugskot, sum kann gera seg galdandi í kappingini.

**Avbjóðingar**
Játtanin hjá Vinnuframa er á 3,2 mió., og hon fylgir ikki við gongdini og tørvinum á stuðli. Ein stórur partur av játtanini fer til rakstur hjá Vinnuframa, serliga tey árini har rentan er lág ella negativ, sum í 2018. Hetta ger, at samlaða stuðulsupphæddin, sum skal vera við til at menna nýggjar vinnur í Føroyum, kann skifta munandi ár fyri ár.

Vinnuframi er einasti grunnur í Føroyum, ið kann játta stuðul til allar vinnugreinar, og umsóknir um stuðul verða viðgjørdar á stýrisfundi átta til níggju ferðir um árið. Tískil er áhugin hjá íverksetarum at søkja um stuðul úr grunninum sera stórur. Men grundað á vantandi fíggjarorku má ásannast, at talan er um fleiri góðar umsóknir, sum stýrið ikki kann ganga á møti. Hetta er avgjørt ein avbjóðing fyri fleiri íverksetarar.

Í 2011 varð Løgtingslóg nr. 59 frá 26. mai 2011 um at nýta part av stovnsfænum hjá Vinnuframa til at innrætta høli til granskingarsetur, viðtikin. Bygningurin á Hoyvíksvegi 51, sum er ogn hjá Vinnuframa, varð í 2012 umbygdur til endamálið fyri umleið 10 mió. kr. Starvsstovutól fyri umleið 6,6 mió. kr. varð eisini fíggjað við stovnsfæi frá Vinnuframa.

Í sambandi við, at stovnsfæið varð niðurlagað, minkaðu rentuinntøkurnar hjá Vinnuframa munandi.

P/F iNOVA varð stovnað til tess at reka granskingarsetrið. iNOVA leigar í dag út til vinnufyritøkur og almennar stovnar, sum hava atgongd til skrivstovuhøli og nýtímans starvstovur og starvstovutól. Eisini kunnu fyritøkur, granskarar og privat fólk leiga køkin, ið er løggildaður av Heilsufrøðisligu Starvsstovuni. Eitt stórt høli, Høllin, verður leiga út til ymisk tiltøk. Eisini eru onnur høli tøk, sum kunnu leigast til ymiskar kanningar í styttri ella longri tíðarskeið.

iNOVA hevur síðani byrjan í 2012 og fram til, at galdandi leigusáttmáli gongur út 1. juli 2019, ikki goldið húsaleigu til Vinnuframa.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Avbjóðingin hjá Vinnuframa er, at hann hevur ábyrgd av at umvæla og røkja bygningin. Harafturat kann væntast, at starvstovutólini, sum frálíður, skulu endurnýggjast. Í miðal javnviga inntøkurnar og útreiðslurnar hjá iNOVA samlað fyri árini 2015-2018. Ongin konsolidering er farin fram í felagnum síðan byrjan. Um iNOVA ikki kann gerast før fyri at gjalda húsaleigu, kann støðan verða tann, at stuðulsjáttanin hjá Vinnuframa má nýtast til at umvæla og røkja bygningin og til endurnýggjan av starvsstovutólunum.

**Verkætlanir frá 2018**
Niðanfyri sæst ein lýsing av fýra av teimum 39 verkætlanunum, sum fingu stuðul játtaðan í 2018. Tað eru fleiri aðrar áhugaverdar verkætlanir játtaðar, men tær eru millum annað vardar av upphavsrætti og verða tí skil ikki lagdar fram fyri almenningin, fyrr enn patent við meira er avgreitt, ella tá vøran er komin á marknaðin.

**Verkætlan 1**

Umsøkjari: Guide to Faroe Islands

Verkætlanin í stuttum: Talgildur marknaðarpallur til ferðafólk í Føroyum

Endamál: Talgildur marknaðarpallur, www.guidetofaroeislands.fo, ið savnar upplivingar, sum føroyskir veitarar hava at bjóða ferðafólki. Marknaðarpallurin skal gera tað lætt og einfalt at leita millum øll ferðavinnutilboð, sum føroyingar bjóða fram. Allir veitarar eru sjónligir á heimasíðuni, og samstundis ber til hjá ferðafólkunum at bíleggja og rinda beinanvegin.

Stuðul: Stýrið játtaði í februar 2018 stuðul sambært stuðulsskipanini 03 Menning.

Úrslit: Arbeiðið við at menna marknaðarpallin hevur gingið væl. Fyrsta útgáva av skipanini varð liðug í mai 2018. Mett varð, at tað fór at hava stóran týdning at hava eitt breitt úrval av ferðavinnutilboðum við frá byrjan. Guide to Faroe Islands varð beinanvegin sera væl móttikin av vinnuni, og í dag eru yvir 30 føroyskir veitarar umboðaðir á marknaðarpallinum.

Í juli valdi Guide to Faroe Islands at gera eitt PR átak og fara alment út. Hetta varð væl umtalað í at kalla øllum føroyskum miðlum og í fleiri norðurlendskum og altjóða ferðavinnumiðlum, herundir umtalað í Standby. Portalurin fekk fyrstu bókingina 1. juli 2018, og longu í januar 2019 eru fyrstu bókingarnar tryggjaðar fyri 2019.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

---

### Verkætlan 2

Umsøkjari: RísFlís ÍVF

Verkætlanin í stuttum: Marknaðarátak fyri skundverða hjá RísFlís

Endamál: RísFlís er í ferð við at menna og marknaðarføra ein nýggjan og sunnan asiatiskan skundverða til føroyska marknaðin. Skundverðin kann samanberast við ein 'sushi sandwich'. Í fyrstu atløgu fer skundverðin at verða til keyps hjá Fast.

Stuðul: Stýrið játtaði í apríl 2018 stuðul sambært stuðulsskipanini 04 Søla til marknaðarátak fyri RísFlís.

Úrslit: Marknaðarrátak fyri RísFlís vardi fýra mánaðir. RísFlís hevur arbeitt við professionellum myndatøkum, myndaviðgerð og sjónbandaupptøkum og -viðgerð. Eisini fingu tey ráðgeving til at røkka út á sosialu miðlarnar Instagram, Facebook og Youtube (Google Ads). RísFlís hevur fingið nógv burturúr, og brandingin hevur gjørt, at RísFlís er vorðið meira kent millum ymiskar málbólkar, sum tey ætla at røkka í framtíðini.

### Verkætlan 3

Umsøkjari: Navia Sp/f

Verkætlanin í stuttum: Luttøka á sølumessu í USA

Endamál: Sum liður í eini strategi at koma á tann norðuramerikanska og kanadiska marknaðin við føroyskum tógvi valdi Navia at luttaka á størstu sølumessuni innan hondarbeiði í Cleveland Ohio, USA. Navia hevði bás saman við amerikanskum samstarvsfelaga. Á messuni luttók Navia á mótashowi og workshops fyri at seta fokus á Føroyar og føroyskt tógv.

Stuðul: Stýrið játtaði í mai 2018 stuðul sambært stuðulsskipanini 04 Søla til luttøku á sølumessu innan hondarbeiði í Cleveland Ohio, USA.

Úrslit: Handlar, sum vitjaðu á messuni, vóru sera áhugaðir í vørunum hjá Navia, og Navia seldi til fleiri handlar í USA og Kanada á messuni. Undirtøkan varð mett at vera sera góð. Handlarnir dámdu væl heildarkonseptið hjá Navia, og staðfest varð, at Navia er sera kappingarført, bæði í prísi og vøruúrvali. Navia metir sum heild, at søluferðin til USA var væleydnað. Síðani tey komu heim, hava fleiri á norðuramerikanska marknaðinum keypt Navia tógv inn, og tey hava fingið sera jaligt aftursvar frá handlunum víðvíkjandi søluni til endabrúkararnar.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

---

### Verkætlan 4

Umsøkjari: Tosa Sp/f

Verkætlanin í stuttum: Lansering av lágprís telefonfelag.

Endamál: TOSA ynskir at skapa differentiering á føroyska telemarknaðinum og bjóða eitt lágprís telefonhald til ung og yngri familjur.

Stuðul: Stýrið játtaði í juli 2018 stuðul sambært stuðulsskipanini 02 Ráðgeving.

Úrslit: TOSA er í løtuni í holt við at finna íleggjarar til at byrja virksemið. Felagið hevur verið sera aktivt seinastu mánaðirnar og hevur fingið nógva umtalu frá føroysku miðlunum. Eisini hevur TOSA verið nakrar túrar uttanlands við Hugskotinum, har tey hava tosað við ung og lesandi um verkætlanina. Felagið fer væntandi av bakkastokki í summar 2019.

**LEIÐSLUFRÁGREIÐING**

**Hagtøl**







| Í kr. 1.000 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Samanlagt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ráðgeving | 609 | 605 | 465 | 287 | 939 | 2.905 |
| Menning | 1.810 | 1.810 | 915 | 2.444 | 1.108 | 8.087 |
| Søla | 1.302 | 950 | 1.252 | 919 | 483 | 4.906 |
| Íalt | 3.721 | 3.365 | 2.632 | 3.650 | 2.530 | 15.898 |

